## Betra liðið vann

Magni Jarnskor viðurkendi eftir dystin ímóti HB, at tað var betra liðið, sum hevði vunnið dystin.

– Vit komu ikki í gongd, og spælið hjá okkum koyrdi illa at byrja við. Eftir at teir høvdu skorað til 1-0, vóru vit væl við í dystinum eina góða løtu, men heldur ikki hesaferð vóru vit serliga farligir, sigur Magni.

– Eftir hálvleikin royndu vit veruliga at trýsta, og tá fingu vit eisini eitt mál, men tá ið teir so skora til 2-1, mistu vit takið, og tá vóru teir aftur við yvirlutan, og sigurin hjá teimum var samanumtikið uppiborin, sigur hann.



## Góðir sigrar á útivølli

HB hevur nú tvær ferðir á rað vunnu greiðar sigrar útivølli, og tað fegnast Tór-Ingar Akselsen um.

– Vit vunnið 3-1 í Runavík og hesaferð 4-1 í Gøtu, og tað er góður sigrar í truplum útidystum, sigur hann.

– Vit spældu væl ímóti GÍ. Teir komu inn í dystin nakað fyri hálvleik og vóru væl við, til vit skora til 2-1, men annars hava vit yvirlutan, og vit eru allatíðina vandamiklari enn teir. Eg haldi ikki, at okkara málmaðurin hevði nakað serligt at gera í dystinum, sigur Tór-Ingar.

# HB er vorðið útivallarlið

GÍ

HB

**Eingin slingur var í valsinum hjá havnarmonnum, tá ið teir í Sarpigerði vundu burturúr heimaliðnum**



*HB hevur ikki tapt í sjey teimum seinastu dystunum, og GÍ hevur ikki vunnið í sjey teimum seinastu dystunum. Her fær ein GÍ-spælari viðgerð fyri ein snudd undir dystinum sunnudagin*

Mynd: Jens Kr. Vang

**GÍ-HB**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað, sum vendir niður, vendir upp, er kend strofa. Henni kunnu teir í HB nú taka undir við. Seinastu árini hevur HB verið heimalið burturav, meðan tað ikki hevur hilnast so væl á útivølli.

Sunnudagin varð aftur staðfest, at í ár trívist HB best aðra staðni enn í Gundadali. Fyri tveimum vikum síðani var avrikið einki at reypa av, og úrslitið móti Skála á heimavølli bar við sær, at HB misti týdningarmikil stig í oddastríðnum.

Ímóti GÍ kundi tað roknast við, at tað ikki fór at ganga nakað serligt. GÍ hevði tvær ferðir fyrr í ár fingið fulla úrtøku móti HB,og tá ið GÍ síðst fekk fulla úrtøku, var tað júst móti HB, sum legði rygg til 2-1 tap í Gundadali 14. juni.

Men hesa ferð gekk tað heilt øðrvísi. HB var omaná mest sum alla tíðina, og HB fór eftir 4-1 sigur úr Gøtu við øllum stigunum.

### Tvær ferðir Rókur

HB hevði størri tyngd og meiri hugflog, enn heimaliðið vísti. Emil Nolsøe Leifsson og Svenn Dam Jacobsen loystu leikbannaða Vagn Mohr Mortensen og Jovan av, og ungu menninir stóðu seg væl.

Rókur Jespersen hevur fyrr í ár havt ilt við at spæla seg til fast pláss í framrættaða partinum. Enn eina ferð hevði Popczynski givið evnaríka unga manninum møguleikan, og hesa ferð eydnaðist tað sera væl hjá Róki.

Rókur setti hol á, tá ið eitt lítið korter var farið. Eftir uppspæl í vinstru smekkaði hann til. Bólturin rakti í liggjandi GÍ verjuspælara og snýtti málverjan so mikið, at bólturin fór í málið.

HB var omaná, men fram móti steðginum kom heimaliðið so spakuliga fyri seg. GÍ trýsti annars sannførandi HB longri aftur á vøllin, og henda gongdin helt fram fyrstu løtuna eftir steðgin.

Eftir lítlan tíma brílslaði danski dómarin fyri brotsspark, sum GÍ liðformaðurin, Sámal Joensen, setti í netið.

At GÍ eftir yvirvág í eina løtu hevði javnað til 1-1 kundi bent á, at nú fór tað at verða heimaliðið, sum fór at seta seg á spælið og harvið at spæla seg til málmøguleikar.

Men soleiðis gekk tað ikki. At GÍ hevði javnað vísti seg at bera við sær, at HB reisti seg aftur. Gestirnir fingu aftur um endan. Takið, sum Sámal Joensen og ungu liðfelagarnir hjá honum tóktust hava tiltuskað sær, linkaði, HB yvirtók spælið, og eftir at teir høvdu skorað til 2-1, tóktist tað bara vera ein spurningur um, hvussu stórur útisigurin fór at verða.

Rókur Jespersen skoraði eisini annað HB málið. Eftir gjøgnumbrot í vinstru tóktist tað sum um, at møguleikin var burtur, tí vinkulin var so spískur, men so smekkaði ungi maðurin til, og bólturin streyk inn við nærra stólpanum.

### Spurningur um støðd á sigrinum

GÍ slepti alt meiri í verjupartinum, og álopsbogin varð spentur. Tað bar møguleikar fyri skjótum HB álopum við sær. Rógvi Jacobsen, sum ikki er so málsøkin, sum hann var, áðrenn hann fór til Íslands, stóð fyri uppspælinum í høgru til triðja málið. Tór-Ingar Akselsen, sum rættuliga er komin fyri seg aftur eftir summarsteðgin og hesa ferð var heilt stinnur, varð skrásettur fyri 3-1 málið, sum minti ikki so lítið á fyrsta málið.

So var spurningurin bara, hvussu stórur HB sigurin fór at verða. Innskifti Páll M. Joensen staðfesti rimmar sigurin. Aftur hesa ferð átti Rógvi Jacobsen stóran lut í uppspælinum, og verjan var fullkomuliga úti av spælinum, tá ið bólturin varð settur í málið.

HB hevur ikki tapt í sjey teimum seinastu uppgerðunum, og GÍ hevur ikki vunnið í sjey teimum seinastu uppgerðunum. Hetta tíðarskeiðið hevur GÍ úrtøkan verið fimm stig. Sama tíðarskeiðið hevur úrtøkan hjá HB verið sekstan stig. At tað er munur á, hvussu væl GÍ og HB eru fyri sást væl í Sarpugerði!





**Varaleiðari hjá Baresso Coffee**

**SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Starvið sum varaleiðari er frá 1. oktober 2006.**

**Saman við leiðaranum hevur tú sum varaleiðari ábyrgdina av ráðlegging og útinning av dagligum uppgávum, tryggja ein skilagóðan rakstur av espresso og kaffistovuni fíggjarliga og viðvíkjandi góðsku, tænastu og reinføri. Við egnum áhuga og skilagóðum mannagongdum tænir tú okkara gestum og hevur ábyrgdina av, at nýggir starvsfelagar fáa ta vitan og venjing, ið krevst fyri at tryggja kaffistovuni ein skipaðan og væl virkandi rakstur.**

**Sum varaleiðari hevur tú verið í venjing hjá Baresso Coffee og fingið starvsfólkaheiðursbræv, áðrenn tú fer í gongd við varaleiðaravenjingina. Tú verður vand/ur upp í teimum ymsu uppgávunum, ið tú fært ábyrgdina av – ein veningarskrá, ið er samansett av ástøði og starvslæru. Eisini her er tað tín vilji og góði hýrur, sum við hjálp frá okkum fær alt til at eydnast væl. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990**

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN